

Ali Naimi, oljumálaráðharri í Saudi-Arabia hevur havt fund við umboð fyri oljulondini Noreg og Russland. Mynd: EPA

# Russland, Noreg og Saudi-Arabia havt fund um oljuprísin

**Jógvan Hugo Gardar**

28.01.2015 - 10:20

Oljan.fo

Oljumálaráðharrin hjá Saudi-Arabia, Ali Naimi, hevur hitt sendiharrarnar hjá Noregi og Russlandi í Saudi-Arabia. Hetta skrivar Bloomberg News, ið hevur tíðindini frá stjórnarvinarligu tíðindastovuni í Saudi-Arabia.

Sambært tíðindastovuni var evni á fundinum javnvágin í altjóða oljumarknaðinum, umframt at partarnir tosaðu um felags íløgur innan olju- og námsvinnuna.

Andy Lipow hjá orkugreiningarfyritøkuni Lipow Oil Associates sigur sambært Bloomberg News at fundurin er komin í lag, tí bæði Russland og Noreg eru óttafull fyri hvat lági oljuprísurin kann merkja fyri innlendis fíggjarstøðuna hjá báðum londunum.

Saudi-Arabia hevur fleiri ferðir sagt greitt í frá at tað verður ikki við teirra hjálp, at tiltøk verða sett í verk fyri at kroysta prísin upp. Saudi-Arabia er sjálvt bangi fyri at skiferoljan í USA kann gera at Saudi-Arabia og Opec-londini missa ein part av heimsmarknaðinum. Skiferoljan er yvirhøvur dýrari at framleiða, og tí meta eygleiðarar at lági oljuprísurin kann vera við til at minka um amerikansku oljuframleiðsluna